Aftur ein skølt

Royn—Skála 1—0 (0—0)
1—0: Ingi Mortensen (87. min.)

Hvalbingar hava gott tak á eysturoyarliðunum: Fyrst megnaðu teir javnleik í Leirvík. Óhoyrt mettu tey flestu, og ÍF var favorittur á heimavølli. Men hvalbingar struku avstað við báðum stigunum. So óheppið úrslit fyri heimaliðið kemur ikki fyri aftur móti Royn, varð sagt, og tað var ikki fritt, at skálamenn vóru hálvir favorittar, tá teir fóru suður leygardagin.

Tá teir vóru á veg norður aftur hevði Royn enn eina ferð staðfest, at tað sanniliga ikki bert er eydna og tilvildin, ið hava havt við sær, at teir hava fingið øll hesi stigini móti eysturoyarliðunum.

Hvalbingar vunnu við tí eina málinum, sum skarprættarin móti fuglfirðingum, Ingi Mortensen, skeyt heilt stutt fyri leiklok.

Reseptin var meinlík henni í Fuglafirði: Skálamenn tykjast ikki nøgdir at fara norður við øðrum stiginum, og royna at leggja trýst á Royn málið. Eftiransnið verjuskyldunum viðvíkjandi gerst minni gott, og so er vandi á ferð. Í ógvuliga skjótum kontraspæli gerst Ingi leysur og skorar.

Teir høvdu ikki nógvar aðrar møguleikar í dystinum, men tað eru sum kunnugt málini, ið telja. Klókliga sláa roynarnir ikki størri breyð upp, enn teir kunnu baka. Tyngdin í leikinum hvílir á tí frálíka málverjanum, sum m.a. bjargaði tveimum drønandi langskotum frá Ásbirni og Agnari og eina ferð, tá John slapp einsamallur ígjøgnum.

Frammanfyri málverjan so mikið uttarlaga, at langskotshóttanirnar gerast veikar, syrgja 6—7 menn fyri verjugarði, og alla tíðina megna einari 3—4 við stórum skjótleika at vera frammi undir og stuðla tí frálíka Inga, sum í alt størri mun tykjast hava sama leiklut sum Jan hjá sumbingum.

Einfalt og effektivt hjá hvalbingum, sum í avgerandi mun tykjast hava sett kósina upp í eina fjálga støðu langt burtur frá øllum niðurflytingarstrikum.

(-nn-)

Aðrir dystir:
Dysturin millum SÍ og LÍF endaði 1-1.

Dysturin ímillum GÍ og B 36 er útsettur til í kvøld klokkan 19.00.

Tí bíða vit eisini við at taka vinnararnar í veddikappingini. Nøvnini vera í blaðnum hósdagin.

ÍTRÓTTAR Sosialurin

Flogfrakt/kurerpost
Taxa/charterflúgving
Kring allan knøttin
Faroe Airways Transport
Main office: Yvri við Strond 6 • FR-100 Tórshavn • Faroe Islands • Phone: +298 17377 • Fax: 18377
Denmark: Tømmerup Stationsvej 10 • DK 2770 Kastrup • Phone: 32527080 • Fax: 32527167

2. deild menn

	d	v	j	t	mál	stig
NSÍ	7	6	0	1	23—3	12
Sumba	7	5	1	1	15—6	11
Royn	7	3	2	2	5—12	8
ÍF	7	2	3	2	18—10	7
Skála	7	3	1	3	10—8	7
LÍF	7	2	3	2	8—10	7
Fram	7	2	2	3	10—15	6
SÍ	7	2	1	4	9—11	5
GÍ	6	1	2	3	7—14	4
B36	6	0	1	5	2—18	1

ÍF óskettið

Fram—ÍF 2—2 (1—1)
1—0: sjálvmál (8. min.)
1—1: Odd Eliassen (26. min.)
2—1: Dagbjartur Hammer (53. min.)
2—2: Ábraham Hansen (86. min.)

Tað var nakað felags fyri bæði Fram málini og nakað var fealgs fyri bæði ÍF málini, tá liðini hittust í Gundadali: Í fyrstu løtuni bæði í 1. og 2. hálvleiki legði Fram seg á odda, men fuglfirðingar megnaðu báðu ferðirnar at svara aftur, og báðu ferðirnar var talan um mál, skorað við høvdinum.

Týðuligt var, at fuglfirðingar ikki vóru nøgdir við annað stigið, og sum dystur leið, royndu teir at leggja eitt ávist trýst á heimaliðið, m.a. við at leika við 3-4 álopsleikarum, uttan at hetta í so stóran mun bar opnar málmøguleikar í sær.

Í staðin fyri at opna spælið og koma afturum verjuna, so oystu fuglfirðingar bóltar úti av vøjllinum og inn í brotsteigin. Nakrar spentar støður stóðust av hesum, uttan at talan var um upplagdar málmøguleikar.

Útjavningarmálið kom, tá bert 5 min. vóru eftir: Frispark úr vinstru verður lyft innfyri, og har er Ábraham hægstur og stútar.

Fyrru útjavningina syrgdi Odd Eliassen fyri, tá hann stútaði horna úr vinstru í kassan. Hann leikti sín fyrsta dyst í 2. deild í ár.

Fram kom á odda, tá bóltur í knæhædd varð smekkaður inn fyri ÍF málið. Bólturin fór framvið málverja og bleiv stýrdur í tómt mál av verjuleikara.

Seinna Fram málið noyðist Ove partvís at taka á sínar herðar. Hann leypur óneyðuga langt út í brotsteigin, og tá bólturin verður trillaður til Dagbjart hevur hann tómt mál at trilla hann í.

(-nn-)

Við SMYRLI
til Skotlands
Ferðaseðil aftur og fram úr 1.300,-.
Strandfaraskip Landsins
Ferðamannadeildin
Tlf. 1 45 50
Norðoya Deild
Tlf. 5 75 66

Ford
Silvur
Bronsa
Ábyrgdarváttan upp til 6 mánaðir
BILSØLA

HM-TILBOÐ
Every game — every goal — every minute — we won't miss a kick . . .
Meðan HM er, ber ikki til at síggja fótbólt og Dag og Viku samstundis.
Vit hava loysnina
Verandi kundar kunnu í hesum tíðarskeiði gera nýggjan leigusáttmála um sjónvarp no. 2 fyri 2/3 av vanligari leigu.

Týsk styrki . . .

. . . — Týsk dygd
SABA
»Ma ma ma ma má á á á á á á á á«
»Gott kvøld — her eru vit við Degi og Viku«
DER VIDEO HI-FI-TV
Niels Finsensgøta 12 Tlf. 1 51 32
hevur sjónvørp til leigu